Álit

í

løgtingsmáli nr. 24/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttaøkið)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 22. september 2020 og eftir 1. viðgerð 24. september 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Dómarafelagið og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Nevndin hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi upphædd, soleiðis at tað framhaldandi ber til at fáa skikkað fólk at taka lut í hesum sjálvbodna virksemi. Nevndin ásannar samfelagsliga týdningin av tí stóra sjálvbodna arbeiði, sum verður gjørt innan ítróttaøkið. Talan er um dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttin, umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum. Hesi fólk, sum brúka sína orku og frítíð til at leiða og venja okkara ungdóm, fáa eina ávísa samsýning frá sínum feløgum. Samsýningin samsvarar tó á ongan hátt við ta tíð og orku, hesi fólk nýta innan ítróttin. Samsýningin skal tí lutvíst síggjast sum ein viðurkenning fyri arbeiðið og lutvíst sum eitt endurgjald fyri tær útreiðslur, hesi fólk sjálvi bera í arbeiði teirra fyri ítróttin.

Innihaldsliga er talan um sama uppskot, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði fram í vár (løgtingsmál nr. 87/2019), men sum varð tikið aftur sum partur av politiskari avtalu millum samgongu og andstøðu orsakað av serligu støðuni við koronu. Í tí uppskotinum var tó ásett, at broytingin fekk virknað frá 1. januar 2020. Nevndin heldur, at tað sama tí eigur at vera galdandi fyri hetta uppskotið, og setir hon tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2 verður orðað soleiðis: “Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2020.”.

Viðmerkingar:

Við hesi broyting fer lógarbroytingin eisini at fevna um skattaárið 2020.

Við hesari broyting og viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 8. oktober 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Uni Rasmussen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Hanna Jensen	